# Oyggjablaðið

## Oyggjaredaktiónin:





Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

## Oyggjablaðið næsta mikudag:

# Eystanstevna

# Væl frágingið

**OYRARBAKKI – Mín uppgáva er heilt einfalt tað at halda tað ruddiligt og reint her í Eydnuni, sigur Edith Dam av Norðskála**

Hóast onkur kann halda, at ein reingerðarkvinna ikki ger stórvegis til nyttu, so sæst tað í øllum førum væl, um hon ikki hevur verið á staðnum.

Ein teirra sum røkir hetta týdningarmikla starvið er 69 ára gamla Edith Dam. Og hetta arbeiðið ger hon fegin fyri ungmannafelagið Eydnan á Oyrarbakka.

– Eg hyggi eisini eftir, um nakað er at taka upp ella at gera. Og tað havi eg gjørt í nógv ár, greiðir hon frá.

Húsið hjá ungmannafelagnum var kanska brúkt meiri fyrr, enn tað er nú. Henda mánaðin er í øllum førum nógv virksemi í húsinum:

Sunnudagin var bingo og nú leygarkvøldið verður dansur í sambandi við Sundalagsstevnuna í Hvalvík. Í aðrar mátar ganga trý lið til Zumba fitness allan henda mánaðin.

Júst av hesi orsøk er neyðugt, at onkur hyggur eftir at tað er nossligt hjá fólki at koma til tey ymisku tiltøkini í húsinum.

Júst hetta hevur verið uppgávan hjá Edith Dam tey seinastu rættiliga nógvu árini.

### Væl frágingið

Mikudagin í farnu viku var Edith aftur farin ein túr í ungmannafelagshúsið.

Hon ætlaði líka at hyggja eftir, um alt var í lagi eftir at ein skúlaflokkur av Sandoynni hevði verið her.

Jú, hon kundi skjótt staðfesta, at her var alt væl frágingið. So í dag var steðgurin ikki so drúgvur.

– Eg haldi, at onkur annar hevur leigað húsið seinni í hesum mánaðinum, sigur hon.

snorri@sosialurin.fo



*Eydna Dam hevur tjekkað av at alt er í lagi í køkinum í Eydnuni. - Her er alt væl frágingið, sigur hon*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Veturin liðugur

**LANDSVEGUR – Nei, nú vænti eg ikki kava aftur, fyrrenn í heyst, sigur William Mackay, sum hevur arbeitt hjá Landsverki síðani 1973.**

Mikudagin í farnu viku møtti William til arbeiðis sum vanligt kl. 8, og fór nakað seinni út at loysa eina av uppgávum sínum henda dagin.

Henda uppgávan var ein av teimum smáu og einfaldu, men kortini ein slík sum ein sær úrslitið av.

Her við rundkoyringina til Norðskálatunnilin settu teir í vetur niður nakrar orange-littar stengur. Endamálið við hesum var at vísa teimum ið rudda kava burtur, hvussu langt út ið rundkoyringin røkk.

Kavastengurnar skuldu nú takast úr, og til tess at forða fyri, at sandur og annað kom niður í holini, verða proppar settir í. So er klárt at seta stengurnar í aftur, tá tað fer at nærkast ímóti vetri.

– Eg haldi eisini, at rundkoyringin sær prýðiligari út uttan hesar kavastengurnar, sigur William Mackay við einum brosi.

### Gjáarvegurin

Ein onnur av teimum týdningarmiklu uppgávunum hjá Williami er kavaruddingin.

Hansara leið, um ein kann siga tað so, hevur verið vegastrekkið við tí nógva og títta kavanum – Gjáarvegurin.

Um veturin tryggjar hann soleiðis, at gjáarfólki kunnu sleppa frá og til bygdini umvegis Funning og Funningsfjarðarvegin.

Hetta er eitt arbeiði sum krevur sín mann á hávetri, men so er eisini gott at kunna gera arbeiði av øðrum slagi á hásumri.

– Einaferð seinni í summar, tá grasið er vaksið eitt sindur meiri, skal so vøllurin í sjálvari rundkoyringini sláast, sigur William Mackay.

snorri@sosialurin.fo



*Tað er vist tíð uppá at taka burtur tey seinastu teknini eftir ein langan og drúgvan vetur. - Nú skulu vetrarstengurnar beinast burtur, sigur William Mackay, starvsmaður hjá Landsverki*

Mynd: Jens Kristian Vang